# Fundarfrásøgn

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Sendast til: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Jørgen Meitilberg (JM), Malan Marnersdóttir (MM) og Hans Pauli Joensen (HPJ) |
| Til staðar á fundinum vóru: | SíJ, JM, MM, HPJ og Randi Frederiksberg (RF) |
| Skrivað hevur: | RF |
| Fundartíð: | Týsdagur, 03. desember 2013, kl. 9 til 12 |
| Fundarstað: | SSS |

## Umrødd evni:

1. **Stutt kunning um lesandi**

   Anna Katrin Matras kunnaði um, hvussu lesandi, ið vórðu upptikin til lesnað í 2012, høvdu hoyrt um útbúgvingartilboðini á Setrinum.

2. **Stutt kunning um greinasavn og intranet**

   Anna Katrin Matras kunnaði á fundinum. Stig verða tikin til at verkseta greinasavn og intranet.

3. **Strategisk kunning, samskifti og miðling – hvussu stýra vit hesum?**

   Leiðslan ynskir at menna eina miðlastrategi og ein politikk fyri kunning og marknaðarføring.

4. **Heimasíðan**

   Arbeitt verður við at endurskoða bygnaðin av heimasíðuni og at viðkomandi upplýsingar verða tøkir á enskum.

5. **Ársfrásøgn 2012 – status**

   Miðað verður ímóti, at ársfrásøgnin verður klár í ár.

6. **Nýggj útbúgving: "West Nordic Studies, Governance and Sustainable Management".**

   Profilur og námsskipan skulu fáast til vega, fyri at útbúgvingin kann formliga góðkennast av MMR.